


*Jútsku politistarnir tóku sær av løttum, og sjálvt um hetta ikki er akkurát eftir bókini, so er hetta eitt gott tekin um góða stemningin, sum var í býnum í gjár*
*Mynd: Uni Holm Johannesen*

# Hugnal

**Meðan tiltiknu viðhaldsfólkini úr Bretlandi skikkaðu sær fyrimyndarligt, gjørdu fullir føroyingar fortreð og endaðu í geglinum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Nú friður aftur valdar aftaná teir báðir stórdystirnar í gjár, hevur onkur helst timburmenn. Hetta vita tey alt um úti á politistøðini í Havn, har ikki færri enn tríggir føroyskir garpar liggja avdotnir aftan á eina rokaliga nátt í býnum.

Teir tríggir vórðu allir tiknir við á støðina um fýratíðina í nátt, tí teir vóru farnir til hendurs og vóru til ampa hjá býarfólkinum.

Menninir, sum eru millum 20 og 30 ár og kenningar hjá politinum, verða avhoyrdir tá teir fáa eygu einaferð seinni í dag. Teir verða skuldsettir fyri brot á politiviðtøkurnar og kunnu passaliga spáka sær oman á posthúsið at rinda hvør sína bót á einar 1000 krónur, sum teir fáa við sær heim av støðini.

## Friðarligir hooligans

Harafturímóti kunnu tiltiknu viðhaldsfólkini hjá Manchester City erpa sær av, at ongir trupulleikar vóru av teimum – hvørki undan, undir ella eftir dystin á Tórsvølli. Av politistøðini verður sagt, at væl mannaðu løgregluliðini helst eiga part av æruni av, at alt gekk so friðarliga fyri seg.

- Tað hevur verið lív í, sum á einari vanligari vikuskiftisnátt. Men kortini hevur onki rok verið – burtursæð frá áðurnevndu føroyingum, sigur vakthavandi á politistøðini við Sosialin.

## Aftur um tvær vikur

Eini 25 jútskir politistar vórðu sendir til Føroya at hjálpa starvsfeløgunum her heima í sambandi við fótbóltsdystin millum EB/Streym og Manchester City



# Nú skal ruddast!

**Sunda kommuna fer nú at rudda allar almennar vegir og øki í kommununi. Bilar, bátar, amboð og annað, sum ikki hevur frámerki, ið sigur, hvør eigarin er, verður beint burtur.**

Øll, sum hava slíkt órudd standandi á almennum øki, verða biðin um at beina tað burtur í seinasta lagi 25. juli 2008. Órudd, sum ikki er burturbeint innan henda dag, fer kommunan at beina burtur. Kommunan tilskilar sær rætt at krevja útreiðslurnar av burturbeiningini endurgoldnar frá eigaranum.

Samstundis heitir kommunan vinarliga á øll, sum hava bilvrak ella annað órudd standandi á egnum øki, um at beina hetta burtur. Kommunan vil fegin leiðbeina nærri um hetta.

SUNDA KOMMUNA

Les meira á www.sunda.fo

